## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin um 7 stig. Týsdagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Kaldari.

# Valentinsdagur og telduvirus

**TELDUPOSTAR**
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

I dag verður Valentinsdagurin hátíðarhildin kring allan heim við kossum, sjokolátu, blomstrum og kærleika. Hóast hetta, er øll orsøk til at vera á vakt, um tú móttekur eina vakra heilsan í telduposti. Nógvir kt-brotsmenn brúka nevniliga júst hendan dagin til at spjaða telduvirus.

Sambært danska Ekstrablaðnum er tað djúpt kriminelli kt-bandin, Storm, sum stendur aftanfyri vandamiklu Valentin-heilsanir. Tann sjúki t-posturin, sum endar í postkassanum hjá tær, inniheldur eini stutt tekstboð og eina leinkju til eina heimasíðu, har tað verða víst otta ymiskar Valentinsmyndir. Hetta sær heilt natúrligt út, men um tú letur myndirnar upp á forritinum, Valentine.exe, so verður teldan hjá tær yvirtikin av Storm-netverkinum.

Sambært danska kt-serfrøðinginum, Peter Kruse, kunnu brotsmennirnir fjarstýra telduni hjá tær og senda spam-t-postar frá tínum postkassa og stjala loyniligar upplýsingar. Við øðrum orðum taka teir ræðið á telduni hjá tær.

Við einum snildum forriti kunnu hesir grava seg djúpt niður í Windows og síggja, hvat tað er, tú tekst við á telduni.

Hetta kann vera torført at uppdaga, men fer teldan bráddliga at arbeiða seint, ella um títt anti-virus-forrit ikki virkar, so eru sannlíkindi fyri, at tú hevur fingið hendan telduvirus, sigur Peter Kruse, ið ræður øllum til at vera á vakt.



### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -18 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 9 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 6 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1048 hPa. við Jan Mayen fer í landsynning. Ein hitabrúgv við Føroyar fer spakuliga í landnyrðing.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Skagerrak fer spakuliga suðureftir. Lágtrýstið vestan fyri Írland fer móti Íslandi.


Sosialurin er við frá byrjanini

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/2 kl. 06[00] – 14/2 06[00]. Hitin í gjár: 5,6°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í februar: 11°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 12/2 kl. 06[00] – 13/2 06[00].
Avfallið higartil í februar: 38 mm

Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

14. feb. Fyrra kvarter/ mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 14. feb. | - | 12.13 | 11.13 | 23.54 | 11.28 | - | 01.32 | 14.13 | 02.32 | 15.13 | 10.28 | 23.09 | 09.28 | 22.09 | - | 12.28 | 00.47 | 13.28 | 11.58 | - | 00.32 | 13.13 |
| 15. feb. | 00.54 | 13.37 | - | 12.37 | 00.09 | 12.52 | 02.54 | 15.37 | 03.54 | 16.37 | 11.52 | - | 10.52 | 23.35 | 01.09 | 13.52 | 02.09 | 14.52 | 00.39 | 13.22 | 01.54 | 14.37 |
| 16. feb. | 02.20 | 14.49 | 01.20 | 13.49 | 01.35 | 14.04 | 04.20 | 16.49 | 05.20 | 17.49 | 00.35 | 13.04 | - | 12.04 | 02.35 | 15.04 | 03.35 | 16.04 | 02.05 | 14.34 | 03.20 | 15.49 |
| 17. feb. | 03.19 | 15.48 | 02.19 | 14.48 | 02.34 | 15.03 | 05.19 | 17.48 | 06.19 | 18.48 | 01.34 | 14.03 | 00.34 | 13.03 | 03.34 | 16.03 | 04.34 | 17.03 | 03.04 | 15.33 | 04.19 | 16.48 |
| 18. feb. | 04.17 | 16.44 | 03.17 | 15.44 | 03.32 | 15.59 | 06.17 | 18.44 | 07.17 | 19.44 | 02.32 | 14.59 | 01.32 | 13.59 | 04.32 | 16.59 | 05.32 | 17.59 | 04.02 | 16.29 | 05.17 | 17.44 |